## Barnið hevur sligið seg í
## — lítil heilaskjálvti



Hendan vegleiðingin gevur góð ráð um, hvat barnið skal gera, og hvat tit sum foreldur skulu vera varug við, um barn tykkara hevur sligið høvdið í.

Ráðini í vegleiðingini skulu fylgjast fyrstu dagarnar eftir tilburðin. Tó er tað serliga týdningarmikið at halda eyga við barninum tað fyrsta samdøgrið eftir tilburðin. Í hesum tíðarskeiði skal barnið ikki vera einsamalt, og teir fyrstu tímarnar eftir tilburðin skal barnið vekjast tvær til tríggjar ferðir; hetta fyri at eftirkanna støðuna.

### Fyrsta døgnið skal serliga ansast eftir, um barnið:

- verður meiri dølskt og fjálturstungið,
- er tungt at vekja,
- vísir tekin til meira høvuðpínu,
- hevur vantandi matarlyst, vaml ella spýr,
- fær krampar

Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo

Skuldu onkur av hesum sjúkueyðkennum víst seg, ella kenna tit tykkum sum foreldur onkursvegna ótrygg við støðuna hjá barni tykkara, skulu tit seta tykkum í samband við antin kommunulækna, kommunulæknavaktina ella skaðastovuna.

Tá barnið hevur sligið høvdið í, hevur tað serliga tørv á hvíld og friði; hetta fyri at eftirrákið frá heilaskjálvtanum, sum serliga kann vera afturvendandi høvuðpína, skal hvørva av sær sjálvum.

## Góð ráð eru tí, at barnið:

bindur frið teir fyrstu dagarnar eftir tilburðin,

ikki luttekur í ógvusligum spæli ella ítrótti,

ikki hyggur eftir sjónvarpi ella spælir teldu ov leingi í senn

Um barnið framvegis hevur sjúkueyðkenni tveir dagar aftaná løstin, eigur tað at verða eftirkannað hjá lækna.

## Góðan bata!

Kommunulæknavaktin og Skaðastovan á Landssjúkrahúsinum




Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo